# Álit

# í

**løgtingsmáli nr. 73/2024: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.** (Áseting av pensjónsaldri)

Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, hevur lagt málið fram 7. mars 2025, og eftir 1. viðgerð tann 14. mars 2025 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 18., 24. og 27. mars 2025.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Landsfelag Pensjónista, Áhugabólk Pensjónista, Næmingaráðið á Glasi, Fakfelagssamstarvið, Samtak, Búskaparráðið, Heilsuhjálparafelag Føroya, landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, saman við Hagstovuni, landsstýriskvinnuna í heilsumálum, Súsonnu Bertholdsen, saman við Heilsustýrinum og landsstýrismannin í almanna- og mentamálum, Eirik í Jákupsstovu, saman við Almannaverkinum.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Johan Dahl, Jaspur Langgaard, Beinir Johannesen og Árni Skaale) hevur hesar viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 67/2017 samtykti Løgtingið at áseta pensjónsaldurin til 67,5 ár í 2025 og til 68 ár í 2030. Umframt hesar konkretu broytingarnar varð eisini ein frymil samtyktur fyri, hvussu pensjónsaldurin skal ásetast í framtíðini.

Hetta er ein leistur, sum átti at verið fylgdur, tí hetta er kontraktin, sum tá varð gjørd við arbeiðsmarknaðin um áseting av pensjónsaldrinum.

Fyriliggjandi uppskot er ein framskundan, tí um leisturin, sum varð samtyktur í 2017, varð fylgdur, kundi pensjónsaldurin komið uppá 70 ár í 2050. Tað er 7 ár seinni, eftir at uppskotið er broytt við broytingaruppskotinum hjá minnilutanum í nevndini.

Okkum vitandi er eingin útrokning gjørd, sum vísir munin millum núverandi uppskot og eitt uppskot grundað á tann frymilin, sum varð samtyktur í 2017.

Aftursvarið frá arbeiðsmarknaðinum hevur eisini verið ógvisligt, so ógvisligt, at landsstýrismaðurin í almannamálum hevur gjørt eitt uppskot til eina pensjónsskipan afturat. Eina sokallaða “tíðartreytaða pensjón”, sum allarhelst verður samtykt í kjalarvørrinum á hesum uppskotinum.

Tann sokallaða tíðartreytaða pensjónin er eitt illa grundað og lítið gjøgnumarbeitt uppskot, sum kann úthola ein stóran part av endamálinum við uppskotinum um at hækka pensjónsaldurin.

Tað er í øllum førum komið fram í hoyringunum, at tað eru relativt nógv, sum kunnu fara at verða fevnd av hesi nýggju pensjónini. Undir hoyringunum er komið fram, at tað er millum 30% og 43% av arbeiðsstyrkini, sum hevur eina yrkisútbúgving sum hægstu útbúgving, og tí eru møguligir kandidatar til hesa pensjónina.

Tað hevur heldur ikki í tilgongdini og í samband við hoyringarnar verið dult fyri, at hetta uppskotið er ein politisk avtala, sum skal tryggja, at eitt annað stórt mál verður gjøgnumført. Ta stóra málið er gerð av eini farleið til Suðuroynna.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við uppskotinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Hans Jacob Thomsen, Kim Durhuus og Liljan Weihe) hevur hesar viðmerkingar:

Pensjónsaldurin á 67 ár varð ásettur, tá fólkapensjónin varð innførd – fyrst í Danmark í 1957 og tvey ár seinni í Føroyum, í 1959. Nógv er broytt síðani tá. Vit liva bæði longur og betur í dag.

Væntaði livialdurin fyri ein 67 ára gamlan mann í 1985/86, sum eru elstu tølini hjá Hagstovuni, var 13,2 ár. Tað vil siga, at hann kundi rokna við at gerast umleið 80 ára gamal. Væntaði livialdurin hjá kvinnum í 1985/86 var eitt vet hægri, 16,1 ár. Hon kundi sostatt rokna við at gerast umleið 83 ár. Árini sum fólkapensjonistur vóru tí í miðal fyri menn 13 ár og fyri kvinnur 16 ár í 1985/86.

Væntaði livialdurin fyri 67 ára gamlar menn og kvinnur í 2022/23 er sambært Hagstovuni ávikavist 17,1 og 21 ár, altso kunnu 67 ára gamlir menn í dag rokna við at gerast umleið 84 ára gamlir og 67 ára gamlar kvinnur 88 ára gamlar. Árini sum fólkapensjonistur eru tí í miðal fyri menn 16,5 og fyri kvinnur 20,5 ár.

Tann hækkandi livialdurin og betraða heilsustøðan hjá eldru ættarliðunum eru orsakirnar til, at flestu grannalond okkara hava gjørt av at hækka pensjónsaldurin.

Tað, at vit liva longur, skeiklar sokallaðu fólkatalspyramiduna. Framskrivingar vísa, at talið á teimum eldri enn 67 ár fer at vaksa nógv komandi árini, og samstundis fer talið á teimum, sum eru í arbeiðsvirknum aldri, 16 til 66 ár, at minka. Lutfallið millum tey í og uttanfyri arbeiðsvirkna aldurin broytist av tí sama. Í 1985 vóru 6,5 fólk í arbeiðsførum aldri fyri hvønn pensjónist, í dag eru tey bara knapt 4 fólk.

Um vit lata standa til og onki gera við pensjónsaldurin verður hetta lutfallið 2,3 fólk fyri hvønn pensjónist um 40 ár. Tørvurin á røkt og heilsutænastum fer bara at vaksa, men vit gerast færri at nøkta tørvin. Tað ber snøgt sagt ikki til at varðveita sama vælferðarstøði, sum vit hava í dag, við hesum lutfallinum uttan so, at tey í arbeiðsførum aldri mugu arbeiða meira og gjalda munandi meira í skatti. Vit missa sum er 20% av hvørjum árgangi til útlondini. Um hetta verður veruleiki, er vandi fyri, at vit missa nógv fleiri.

Tí mugu vit sum politikarar gera av, hvørt vit ynskja at framtíðartryggja okkara vælferð og styrkja samhaldsfestið millum ættarliðini, so okkara eftirkomarar kunnu njóta somu vælferð sum vit. Um ikki, mugu vit hava dirvi nokk til at siga, hvussu vælferðin verður skorin. Er tað á heilsuøkinum? Á eldraøkinum? Ella kanska á barnaøkinum?

Minnilutin ynskir, at Føroyar skulu vera eitt vælferðarsamfelag í dag, í morgin og um 40 ár. Við at hækka pensjónsaldurin líðandi til 70 ár, fer væntaða áramálið sum pensjónistur ikki at vaksa líka nógv, sum tað hevur, síðani fólkapensjónin bleiv innførd síðst í 1950’unum. Harafturat fara vit øll at vera nøkur ár afturat á arbeiðsmarknaðinum, sum betrar um lutfallið millum arbeiðsfjøld og pensjónistar.

Tað fer at styrkja samhaldsfestið millum ættarliðini og betra munandi um fíggjarliga haldførið. Tvær fortreytir fyri, at okkara børn og barnabørn eisini kunnu liva og virka í einum framkomnum landi, við høgari vælferð og trivnaði hjá øllum aldursbólkum.

Víst hevur verið á frá fleiri hoyringarpørtum, at pensjónsaldurin eigur at hækka í størri millumbilum enn uppskotið leggur upp til, ikki minni enn eitt hálvt ár í senn, og at tað eigur at vera meira gjøgnumskygt, hvør pensjónsaldurin er fyri hvønn aldursbólk. Minnilutin mælir til ein pensjónsaldur við millumbilum eins og í talvuni niðanfyri:

| **Ár** | **Pensjónsaldur** | **Galdandi fyri persónar føddir** |
|---|---|---|
| Inntil 1. juli 2024 | 67 | Áðrenn 1. juli 1957 |
| 1. juli 2024 | 67,5 | 1. juli 1957 til 31. des. 1962 |
| 1. januar 2030 | 68 | 1. jan. 1963 til 31. des. 1966 |
| 1. januar 2034 | 68,5 | 1. jan. 1967 til 31. des. 1968 |
| 1. januar 2037 | 69 | 1. jan. 1969 til 31. des. 1970 |
| 1. januar 2040 | 69,5 | 1. jan. 1971 til 31. des. 1972 |
| 1. januar 2043 | 70 | Aftaná 31. desember 1972 |

Tí setir minnilutin fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

Í § 1, nr. 1, verður § 4 orðað soleiðis:

"**§ 4**. Fólkapensjónsaldurin er:
1) 67 ár fyri persón, ið er føddur áðrenn 1. juli 1957.
2) 67,5 ár fyri persón, ið er føddur í tíðarskeiðinum 1. juli 1957 til 31. desember 1962.
3) 68 ár fyri persón, ið er føddur í tíðarskeiðinum 1. januar 1963 til 31. desember 1966.
4) 68,5 ár fyri persón, ið er føddur í tíðarskeiðinum 1. januar 1967 til 31. desember 1968.
5) 69 ár fyri persón, ið er føddur í tíðarskeiðinum 1. januar 1969 til 31. desember 1970.
6) 69,5 ár fyri persón, ið er føddur í tíðarskeiðinum 1. januar 1971 til 31. desember 1972.
7) 70 ár fyri persón, ið er føddur aftaná 31. desember 1972.
*Stk. 2.* Í 2030 verður pensjónsaldur fyri persón føddur aftan á 31. desember 1972 ásettur í løgtingslóg, galdandi frá í fyrsta lagi 1. januar 2044. Pensjónsaldur verður ásettur við støði í mettari gongd í livialdrinum frameftir."

<u>Viðmerkingar:</u>
Við broytingini verður pensjónsaldurin ásettur við størri millumbilum við ikki minni enn einum hálvum ári í senn. Á henda hátt verður meira gjøgnumskygt, hvør pensjónsaldurin er fyri hvønn aldursbólk.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Trivnaðarnevndin, 28. apríl 2025**

| | | |
|---|---|---|
| Liljan Weihe<br>næstforkvinna | Beinir Johannesen | Jaspur Langgaard |
| Johan Dahl | Árni Skaale | Hans Jacob Thomsen |
| | Kim Durhuus | |